# Skjótast selda bókin nakrantíð

Mánadagin kemur Harry Potter og Eldbikarið eftir J. K. Rawling út í føroyskari týðing. Hetta er fjórða bókin í røðini um Harry Potter og vinir hansara í Hogwarts, skúlanum fyri gandakynstur og galdralist. Bókin er góðar 600 blaðsíður og er skjótast selda bókin nakrantíð




Harry Potter og Eldbikarið kemur út í komandi viku

ÚTGÁVA

Harry Potter fepurin herjar aftur. Næsti filmurin um unga gandakallin er fyri stuttum frumsýndur um allan heim, í gjár í Havnar Bio, og mánadagin kemur fjórða bókin um Harry Potter, ið eitur Harry Potter og Eldbikarið út í føroyskari týðing. Malan Háberg hevur týtt hesa fjórðu bókina.

Hinar tríggjar hevur Gunnar Hoydal týtt.

Søgugongdin í fjórðu bókini er minst líka spennandi, sum í teim undanfarnu bókunum. Summarfrítíð er, og skjótt fer Harry Potter undir fjórða árið í Hogwarts. Harry telur dagarnar, tí nógv er at læra, hann sleppur aftur at spæla quidditch, og hitta vinfólkini. Men Harry noyðist at ansa sær, tí vandin lúrir alla tíðina....



J. K. Rawling hevur hugtikið børn og vaksin um allan heim. Sjálv hevði hon ikki roknað við, at bókin fór at siga so nógvum nakað

### Hendingaríkt

J.K. Rowling, høvundurin at Harry Potter, heldur á at gera lesaran bæði fegnan og bilsnan. Fáur høvundur hevur sum hon megnað at rúnarbinda lesaran við blómandi, krevjandi og hendingaríkum frásøgukynstri.

J. K. Rawling hevur í fleiri samrøðum sagt, at hon ongantíð hevði ímyndað sær, at fólk fóru at taka so væl ímóti Harry Potter, sum tað hevur víst seg.

- Eg hevði ikki roknað við, at meiri enn nøkur fá fóru at tíma at lesa um Harry Potter.

Treyðugt so. Bøkurnar um Harry Potter eru størstu metsølubøkur nakrantíð. Fyrstu tríggjar bøkurnar um Harry Potter eru týddar til 42 mál, eru prentaðar í meiri enn 145 miljónum eintøkum. Tær fyrstu tríggjar hava selt fyri 480 miljónir pund í trý ár. Men fjórða bókin setur øll met. Hon er prentað í 5,3 miljónum eintøkum og er seld fyri 1,8 miljónir pund, áðrenn hon er komin út.

### Hví so hugtakandi

Spurningurin er so, hví bøkurnar um Harry Potter hugtaka so nógv. Ein ungur lesari talar fyri sítt ættarlið:

- Bøkurnar um Harry Potter eru sum lívið, bara betri.

Ummælarar eru nærum á einum máli um, at J. K. Rawling er vorðin betri við tíðini at skriva.

- Søgugongdin er frá byrjan til enda eitt putlispæl við ørgrynnu brigdum, sum øll eru tengd og treytað av hvør øðrum. Onki er við at tilvild og onki verður sagt, sum ikki gevur meining fyri heildina. Eitthvørt sum kanska tykist óskiljandi í fyrstu bók, fær meining í fjórðu bók. Tað krevst av høvundinum eitt ófatiliga yvirlit at hava tamarhald á øllum, sum fer fram. J. K. Rawling megnar at halda tráðunum í søguni atskiltar til endan, tá hon kókar alt saman í eina niðurstøðu. Og hon dugir ómetaliga væl at seta seg inn í, hvussu eitt barn hugsar, sigur Malcolm Jones í Times.

Tá fjórða bók kom út, tustu børn í hópatali í Onglandi og USA í bókabúðirnar at ogna sær eina bók, áðrenn útselt varð. Søgur høvdu gingið um, at onkur týðandi persónur í søguni fór at lata lív í bókini. Hvør tað kundi vera vildu øll finna út av beinanvegin. Forlagið hjá J. K. Rawling hevði hildið øllum dult, eisini sjálvt heitið á bókini, líka til útgávudagin. Tað var eftir áheitan frá sjálvum høvundinum, tí sum hon hevur sagt.

- Eg vildi, at øll børn skuldu sleppa at lesa bókina um somu tíð út frá somu fortreytum.

Men ikki øll eru rakt av Harry Potter feprinum. Nógv foreldur og konservativir átrúnaðarbólkar í USA hava lagt J. K. Rawling undir at ganda børnini. Og bókin er bannað í skúlum í Kansas og Kolorado.

- Einki nýtt er í tí. Tað vilja altíð vera nøkur, sum síggja ilt í øllum, sigur Michael Patrick Hearn, ritstjóri.

### Klassikari

Longu nú eru tað bókmentafrøðingar, sum hugleiða um, um bøkurnar um Harry Potter verða bókmentaligir klassikarar. Tað er ilt at meta um, um hesar bøkurnar fara at yvirliva ættarlið eftir ættarlið. Rætt er, at tær innihalda nógv brigdi, sum eyðkenna klassiskar barnabókmentir, og tær bestu barnabøkur bergtaka eins nógv vaksin sum børn. Hesar treytir lúka bøkurnar um Harry Potter. Men nógvar góðar ævintýrkendar bøkur til størri børn koma út nú á døgum og fleiri teirra standa seg væl í kappingini við Harry Potter. Bert tíðin fer at vísa, um søgurnar um Harry Potter og vinfólk hansara í Hogwarts fara at verða lisnar av komandi ættarliðum. . . .

### Bretsku bløðini skrivaði m.a.:

"Ikki ein einasta síða er keðilig... Alt fellur upp á pláss sum eitt undurfult putlispæl."
*The Sunday Express*

"J.K. Rowling hevur megnað at liva upp til tað, vit vónaðu.... Hennara besta bók higartil."
*The Sunday Telegraph*

"Harry Potter og eldbikarið er endiliga útgivin. Og er bókin góð? Tað kanst tú vera vísur í! Fjórða árið hjá Harry – og okkum – í Hogwarts er stuttligt, fult í frálíkum keipumyndum av okkara egna heimi, og stappað við spennandi hendingum."
*The Times*





# Ljómur úr fjarskotnum kirkjuhorni

Herfyri kom ljómfløga við kirkjukórinum Ljómi úr Vági. Og kórið er ikki bara eitt kór millum onnur, men eitt hitt elsta — og mest virda — kór í landinum. Kórið hevur havt, og hevur, stóran týdning í mentanarlívinum í heimliga umhvørvinum. Men fløgan við Ljómi er eisini ein varði, ið vísur øllum føroyingum á leið, bæði fram og aftur

TÓNLEIKAUMRØÐA

*Dagfinn Olsen*

Kirkjukórið Ljómur úr Vági hevur givið út fløgu við 18 sangum, ið allir kunnu bólkast undir heitið; føroyski sangskatturin.

At fara undir slíka útgávu er eitt stórt tak og kórið hevur síðani 1999, seksti ár eftir stovnan, arbeitt við ætlanini og upptøkum. Sostatt hevur ætlanin tikið 4 ár, men er nú loksins veruleiki. Og tað er gleðiligt, tí kórfløgur fylla ikki so nógv á føroysku fløguhillini.

Longu fløguhúsin bendir á, at her er gott í væntu. Og so er. Ljómur prógvar seg sum dugnaligt kór. Sum nevnt verður í húsanum av Arnfinni Thomassen, formanni kórsins, so hevur í áravís ljómað í útvarpssendingum, at "vit hoyrdu kirkjukórið Ljóm..".

Eisini tónleikarin úr Fuglafirði, Frits Johannesen, hevur áhugaverda hugleiðing í fløguhúsanum, har hann eisini staðfestir tann grundfesta týdning, Ljómur hevur millum kórfólk og føroyingar flestar.

Viðvíkjandi húsanum, sum er sera snøggur, er at siga, at kendi danski myndamaðurin Per Folkver hevur tikið myndirnar og hevur hann sagt, at hann hevur roynt at mynda ein "klang". Snøgga perman, sum er oblatfatið í Vágs kirkju, har litmosaikkvindeyguni speglast í, undirstrikar hesa fatan. Ljómur gav kirkjuni fatið, tá kirkjan fylti fimti.

Annað forkunnugt er, at spælt verður á fløguni á nýumvældu urguna, sum brøðurnir Petur Hans og Jákup Dahl góvu kirkjuni í 1872. Knud Olsen, Keypmannahavn, smíðaði. Hetta er helst elsta urga í Føroyum, í øllum førum, um hugsað verður um virkandi urgur.




Edith Dahl (1908-1960) tók stig til at stovna kórið í 1939. Hetta var í samband við, at nýggja kirkjan í Vági var liðug. Edith Dahl stjórnaði kórinum til sín doyggjandi dag, í samfull 21 ár.

Seinni hava onnur stjórnað, t.d. Alfred Dahl. Og beiggjarnir Jóannes og Niels Nolsøe hava havt stóran týdning fyri kórið. Jóannes leiddi kórið í 1980'unum og 90'unum og telist eisini millum navnframastu kórleiðarar seinnu mongu árini.

Men síðani Jóannes Nolsøe leitaði sær burtur at starvast sum urguleikari burturav, hava kórleiðararnir verið mangir hjá Ljómi: Ólavur Hátún, Jens Mortan Mortensen, Hans P. Torgarð, Dorte Tilma, Anki og Claus Telling.

Men í samband við útgávuna hevur Ljómur samstarvað við kenda kórleiðaran úr Osnabruck í Týsklandi, Johannes Rahe. Hann hevur vant við kórinum og stjórnað undir upptøkunum. Eisini Hans P. Tórgarð og Dorte Tilma hava vant kórið.

Til upptøkumann hevur Ljómur valt finnan Matti Heinonen. Samstarvið við hesar er komið í lag via Rúna Brattaberg, operasangara, sum sjálvur byrjaði sína sangleið í Ljómi. Hann hevur eisini verið hjálparmaður og vegleiðari.

Og úrslitið av miðvísa baksinum, sum tað er at gera eina fløgu, er ein góð og sera snøgg kórfløga.

Her eru 18 av okkara væl kendu sangum og sálmum. Formaður kórsins sigur eisini í fløguhúsanum, at er talan um tveir serkønar, sum arbeiða við einum kóri, sett saman av leikfólki, í einum fjarskotnum kirkjuhorni í heiminum. Lætt var tað ikki, men kórlimirnir syngja, tí teimum dámar tað.

Og júst hetta er eftir mínum tykki ein dygdin við Ljómi. Kórið er lítið (hóast styrkt til fløguna), og landafrøðiliga langt frá miðstaðar mentanarmeldrinum. Men hesi fáu hava altíð ljómað sum fleiri. Mest tí góðskan altíð er í hásæti.

Mangar eru løturnar, har Ljómur hevur sett dám á tiltøk. Og tá ein so hevur hugt nærri, so hevur ein undrast á henda lítla skaran av eldsálum, sum — hóast mangan undir opnum himni- hava fylt hvønn krók, sum var talan um stóra mannfjøld.

Upptøkurnar á fløguni eru farnar fram í Vágs kirkju. Eitt styrkt kór syngur fagurliga. Fari ikki at royna at siga so nógv ella koma við viðmerkingum um hetta og hatta. Veit ikki um eg havi skil og førleika til tess. Greitt er, at tað er flott at hoyra Ljóm. Og at urga eisini er við á nøkrum upptøkum, lyftir bara verkið hægri.

At upptøkurnar eru farnar fram í Vágs kirkju, í heimliga umhvørvi kórsins, er eftir mínum tykki gott og stuttligt — so at skilja, at eg meti vera gott, at freistingin at fara í útvarpshøllina ella aðrastaðni ikki rein við. Meira virði er í hesum. Er líkasum meira veruligt. Sum tað eigur at vera.

Kann vera, at úrslitið hevði verið øðrvísi, um upptøkurnar fóru fram aðrastaðni. Kirkjuljómurin, ljóðviðurskiftini, eru sertøk og sera góð. Men um ein ljóðmaður heldur tað sama, veit eg ikki. Kundi hugsað mær, at tað ikki altíð er tað sama, at tað ljóðar væl til liveframførslur og so hinvegin til upptøku. Alt afturljóðið er helst ein avbjóðing til ljóðmannin.

Leggur ein fløguna á, so er einki at finnast at. Væl er framført og væl ljóðar. Skal nakað sigast, so er tað júst hetta, at tað er, sum er ov knapt í støðum. Kanska vit kunnu kalla tað samanlop. Ilt er at skilja, hvat verður sungið. Men kanska er hetta at fara ov langt og at leita eftir onkrum at finnast at.

Vert er at nevna, at hugaligt er at hoyra Tjóðsangin í nýggjum búna (haldi meg vita at tað er tann upprunaligi) við satsi eftir Bjarna Restorff. Útgávan, sum vit eru so von við, er ein útseting fyri hornorkestur.

Eitt av elstu, minstu, bestu og fjarskotnastu kórum í landinum hevur tikið eitt megnar tak. Og tey í Ljómi kunnu av røttum vera errin av úrslitinum og vit onnur kunnu fegnast og njóta verkið. Ein varði, ið vísur aftur í søguna, men sum eisini prógvar dygd og vilja, sum ber fram á leið.